# Klædningar fyri 247.000 ganga sum heitt breyð



Summar fyritøkur stóla blint upp á, at heimsins 1-2% ríkastu leggja líka lag í fíggjarkreppuna, tá tað ræður um klædnabudgettið. At senda eina røð av klædningum á marknaðin til eina kvarta millión fyri hvønn, krevur ís í maganum og eina nærmast blinda trúgv upp á framtíðina. – Timingin er kanska ikki hin besta hjá okkum, sigur Andrea Perrone frá klædnafyritøkiuni Brioni, sum júst hevur sent eina røð av heimsins mest eklusivu klædningum á gøtuna. Og longu hava »tey ríkastu av teimum ríku« keypt 30 av nýggju klædningunum. Avgerðin um at senda klædningarnar á marknaðin varð tikin í heyst, men síðani er nógv vatn runnið undir brúnni. Men tað eru eftir øllum at døma nøkur, sum sleppa snikkaleys undan kreppuni. Vónirnar eru, at tey yvirríku fara at sleppa teimum stóru, men heldur bíligari kendu merkjunum sum Louis Vuitton og Coach og fara eftir avgjørda eittaranum – serliga tá mann í einari kreppu kann standa eyka ríkur fram við euyka dýrum klædningi, skrivar boersen.dk.

# Stórt norskt trýst liggur á Føroyum

**- Norðmenn siga, at teir hava ikki stundir at samráðast fyrr enn týsdagin í næstu viku, um Føroyar halda, at samráðingarnar skulu taka uppaftur tá, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

FISKIVINNUSTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í løtuni er einki nýtt í trætuni millum Føroyar og Noreg um nýggjan fiskiveiðisáttmála fyri 2009.

Hetta merkir í fyrsta lagi, at teir fýra føroysku flakatrolararnir, sum hesa tíðina av árinum plaga at hava góðan fiskiskap í norskum sjógvi, ikki sleppa á tær leiðir, sum geva størstu og bestu úrtøkuna.

Í staðin royna skipini í gráu leiðini og bíða eftir, at fiskiveiðisáttmálin skal koma upp á pláss.

Men enn røkist einki fyri, at nøkur loysn er í ljósmála.



*Jacob Vestergaard hevur tikið fiskiveiðistríðið millum Føroyar og Noreg upp á landsstyrisfundi í morgun*

## Málið til umrøðu

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, sigur, at hann á landsstýrisfundi í morgun fór at taka málið um sáttmálastríðið millum Føroyar og Noreg upp.

Hann sigur, at seinastu dagarnar er ikki tað stóra hent í trætuni millum londini.

- Vit hava havt samband við norðmenn. Teir siga, at teir hava ikki stundir at samráðast fyrr enn í fyrsta lagi í týsdagin í næstu viku – um Føroyar halda, at vert er at taka samráðingarnar uppaftur tá.

Sum skilst á Jacobi Vestergaard eru norðmenn ikki so ótolnir eftir at fáa fiskiveiðisáttmálan upp á pláss, sum føroyingar eru.

Vit spurdu tí landsstýrismannin, um hetta møguliga merkir, at norðmenn framhaldandi ætla sær at krevja somu 85% av eykakvotuni av makreli, sum teir gjørdu undir samráðingunum herfyri.

- Ja, tað er ilt at siga, men óhugsandi er ikki, at teir vilja halda fast um hetta, sigur hann.

## Ikki lítillátnir

Stríðið millum Føroyar og Noreg tók seg upp, tá norðmenn herfyri vóru í Føroyum til samráðingar um nýggjan fiskiveiðisáttmála.

Í staðin fyri at samráðast um traditionellu avtaluna millum londini, settu norðmenn seg í byrjanini av samráðingunum upp á aftur-



*Stelkur og Bakur landaðu 80.000 pund í Saltangará seinasta fríggjadag. Teir gjørdu av at bróta túrin av, tí líkindini vóru so vánalig – og heldur byrja nýggjan túr*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ísfiskatrolarar lakari fiskiskap

**Hesa vikuna hava tveir ísfiskatrolarar landað í Saltangará, og væntandi er ikki, at nøkur stórvegis landing verður aftur fyrr enn í næstu viku**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ísfiskatrolararnir Heykur og Falkur eru í Saltangará í morgun við umleið 440.000 pundum av upsa. Hetta er ein vanligur túrur hjá skipunum, sum hevur vart í eina góða viku.

## Línu-og gørn

Línuskipið Váðasteinur er eisini inni í dag. Teir hava millum 40.000 og 50.000 pund, sum teir hava fingið á Reykjanesrygginum. Meginparturin av veiðini er toskur.

Garnaskipið Oknin landar eisini í dag; teir hava eini 8.000 pund av svartkalva.

Á landingarmiðstøðini í Saltangará vænta tey ikki tær stóru landingarnar aftrat hesa vikuna, men heilt óhugsandi er ikki, at onkur landing verður seinni í vikuni.

- Sum er, vænta vit einki aftur fyrr enn mánadagin, men man veit jú ongantíð, um skipini renna seg í nógvan fisk, siga tey.

## Aðrar landingar

Seinasta fríggjadag løgdu Stelkur og Bakur eina minni nøgd av fiski upp. Teir gjørdu av at bróta túrin av, tí líkindini vóru so vánalig – og heldur byrja nýggjan túr. Veiðan, teir løgdu upp, vá 80.000 pund.

Seinasta hósdag landaðu Stjørnan og Polarhav í Saltangará. Teir høvdu 418.000 pund.

Mikudagin vóru Jaspis og Ametyst inni við 228.000 pundum, og týsdagin vóru Rókur og Lerkur við 364.000 pundum.

At kalla øll veiðan hjá ísfiskatrolarunum er upsi.

# Minkar burtur av tíðini

**- Eg skilji væl, at landsstýrið noyðist at finna út av, hvat úrspælið mótvegis norðmonnum skal verða, men hjá flakatrolarunum ræður um at sleppa í norskan sjógv skjótast gjørligt, sigur Anfinn Olsen, reiðari á Vesturvón**

SÁTTMÁLASTRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir, sum eiga og reka flakatrolararnar, fylgja væl við gongdini í fiskiveiðitrætuni millum Føroyar og Noreg, nú sáttmálaloysi er millum partanar.

Anfinn Olsen, reiðari á Vesturvón, veit at siga, at landsstýrið á fundi í morgun fer at viðgera støðuna, sum hevur tikið seg upp millum Føroyar og Noreg.

- Eg skilji væl, at landsstýrið noyðist at finna út av, hvat útspælið hjá Føroyum skal verða, nú kravið hjá norðmonnum er, at teir skulu hava 85% av eykakvotuni av makreli – og Føroyar bert 15%.

## Torfør træta

Reiðarin dugir eisini at síggja, at samráðingarnar, sum liggja fyri framman, kunnu gerast torførar.

- Sum vit hava skilt, vóru Føroyar undir seinastu samráðingum slett ikki fyrireikaðar upp á norsku krøvini um eykakvotuna av makreli, tí norðmenn høvdu ikki boðað frá hesum frammanundan.

Anfinn harmast um, at málið um býtið av makrelinum hevur ført til,